KUNNINGARSKRIV

2015

Mynd: Rúna Joensen

Kunningarskriv 2015

Góðu borgarar í Sørvágs kommunu

Sitandi bygdaráð fer nú undir sítt síðsta ár í hesum bygdaráðsskeiði. Sum ofta áður sagt, so byggir eitthvørt stýri á herðarnar og undanfarnum, so tey, sum sita í ár, gera fíggjarætlan fyri tey, sum koma at sita í bygdaráðnum frá 2017. Um nýggja bygdaráðið tekur undir við teimum raðfestingum, má so tíðin vísa.

Sitandi bygdaráð brúkti størsta partin av játtanini í 2013 til skúlan. Í kunningarskrivinum í 2014 skrivaðu vit, at nú varð tað arbeiðið, sum byrjaði í 2008 við Gamla skúla, síðani sjóvarhita og dagføringin endaliga lokin.

Samstundis varð víst á, at tann skúlin vit kalla nýggja skúla, er ikki so nýggjur, sum vit gera hann til. Hann var tikin í brúk á heysti 1989, og er sostatt farin um tey fyrstu kvart hundrað.

Í tíðindaskrivinum í fjør søgdu vit, at tað neyvan fór at verða pláss fyri teimum stóru íløgunum, meðan umbyggingin av Sýnini fór fram, samstundis sum ætlanin var at minka um skuldina.

Gongdin í samfelagnum hevur við lækkandi rentum og hækkandi inntøkum gjørt, at størri íløgur eru gjørdar, sjálvt um skuldin er lækkað munandi.

Ætlan fyri íløgur í 2015.

Fólkaskúlin	300.000,-
Søvn og mentan	200.000,-
Ítróttaranlegg	600.000,-
Fríðkan av kommununi	445.000,-
Byggibúning	100.000,-
Vatnveiting	100.000,-
Vegir	1.100.000,-
Kloakkir	1.044.000,-
Gøtuljós	100.000,-
Havnir og lendingar	700.000,-
	4.689.000,-

Skúlin hevur í fleiri ár fingið somu upphædd, sum í høvuðsheitum fer til dagføring av undirvísingaramboðum.

Upphæddin til søvn og mentan fór til bókaverkið Sørvágs kommuna – hundrað ára minnisrit, sum øll húski í kommununi fingu ókeypis. Áhugin fyri bókini hevur verið stórur, ikki bert í okkara kommunu, men eisini millum fólk aðrastaðni, sum hava ættarbond hiðani.

Felagshúsið á Dungasandi skuldi sambært ætlanini hava 600.000,- í ár, men bygdaráðið hevur samtykt at veita ta játtan, sum ætlað var fyri 2016, nevniliga 500.000,- kr., sum eykajáttan í ár umframt kr. 350.000,- kr., so byggingin av niðara parti av húsinum verður væntandi liðugur fyrr enn ætlað. Umframt bygdaráðið, so stuðlar Fótbóltssambandið eisini byggingini.

Upphæddirnar til fríðkan og kloakkir tríva ofta inn í hvørja aðra. Flestu kloakkútlátini rundan um stóru áirnar renna út í tær, og tí verður neyðugt at verja nýggju rørskipanirnar, sum liggja í áarbakkanum. Tað hava vit gjørt í Kirkjuánni og í ár er norðari partur av Stóránni oman fyri Konshyl eisini grótlaðaður.

Í samband við tangaskipanina á Niðaravegi, so er hon eitt stórt stig á leiðini. Trykkleiðing er løgd í vegin heim móti Konshyli, og ætlanin er í nærmastu framtíð at fáa bundið rørskipanir saman, sum skulu tvørtur um Konshylsbrúnna og oman á Dungasand.

Kloakkir og útlát verða fastir fúsir í kunningarskrivinum nógv ár fram. Smáu bygdirnar í kommununi eru nógv betur fyri, tá talan er um, kloakkútlát, og tí verður meginparturin av íløguupphæddini brúktur í Sørvági.

Upphæddin til vegir fór í høvuðsheitinum til nýggja vegin niðan í íbúðirnar í Billubønum og til Garðsvegin, sum var við at fara í hundarnar.

Á havnarøkinum hevur verið trongligt í alt ár. Og tað fegnast vit um. Ferðavinna, onnur vinna og framleiðslubygningar hjá Luna krevja pláss til fólkið, ið kemur frá nær og fjar, og tí gjørdi bygdaráðið av at keypa smiðjuna hjá Jaspur Joensen. Endamálið við keypinum var at ríva hana niður fyri at geva pláss til bilstøðlar og annars rúmka um.

Læknahúsið.

Ein sjónlig íløga í kommununi, sum ikki var við í ætlanini fyri 2015, eru læknahúsini, sum Elisabeth Thorsteinsson hevur búð í í eitt mannaminni. Eftir langan arbeiðsdag valdi hon at siga upp, og kommunan stóð eftir við einum bygningi sum, annaðhvørt skuldi seljast ella brúkast til okkurt skilagott.

Vit settu okkum í samband við Almannaverkið, sum var áhugað at leiga bygningin treytað av umbyggingini. Tær eru gjørdar, og vit ynskja at búfólk og starvsfólk fara at trívast undir Húsadalsvegi.

Mynd: Erik Davidsen

Samanumtikið

Vit kunnu siga nú við árslok, at vit náddu tí, vit settu okkum fyri í samband við fíggjarætlanina í 2015 og nakað væl meira afturat. Fyrr var illa, vil onkur siga, meðan onnur siga, at sterkir herðar skulu til at bera góðar dagar.

Á myndini niðan fyri síggja vit kommunuskattin frá 2010 – 2015



Inntøkan fyri 2015 er 11 teir fyrstu mánaðirnar í árinum og mett, hvat inntøkan verður í desember.

P/F Skattur 2010 - 2015



Teir høgu stabbarnir avspegla skattligu gongdina hjá Hiddenfjord (Luna)

Men okkara tilvera er annað enn talvur og tøl. Maður er mans gaman, verður sagt og vit hava brúk fyri hvørjum øðrum, bæði í gleði og í sorg. Fari at enda henda partin við trimum tiltøkum, sum hvørt í sínum lagi vóru jalig og hugnalig.

Ramsarætlan fyri Mykines.

Sum kunnugt vóru trý øki í Føroyum útnevnd til Ramsarøki, nevnliga Nólsoy, Mykines og Skúvoy.

Á vári 2015 varð Ramsarnevndin fyri Mykines skipað við tí høvuðsendamáli at gera eina ætlan fyri Mykines.

Limirnir í Ramsarnevndini fyri Mykines:

Hagastýrini í Mykinesi: Eddie Lauritsen, Bjarni Hansen, Finn Danberg og Esbern í Eyðanstovu.

Ramsarumboð í Mykinesi: Jákup í Løðu

Onnur við tilknýti til Mykines: Heini Heinesen, Suni Abrahamsen og Hans Michael Johannesen.

Sørvágs kommuna: Sune Jacobsen

Kunningarstovan í Vágum: Sølvi Símunarson

Søvn Landsins: Janus Hansen

Umhvørvisstovan: Maria Gunnleivsdóttir og Suni Petersen.

Ætlanin fyri Mykines varð løgd fram á borgarafundi í Mykinesi 11. september 2015. Tað er Umhvørvisstovan, sum hevur skrivað og samskipað arbeiðið. Vón okkara er, at tikið verður væl ímóti ætlanini, og at tilmælini verða fylgd, soleiðis, at tiltøk kunnu setast í verk, sum tryggja, at fuglur í Mykinesi kann trívast uttan hóttanir og óneyðugt órógv, bæði nú og í framtíðini.

Nevndin ivast ikki í, at um rætt verður farið fram, kann Ramsar tilmenningin virka mennandi fyri oynna, ikki minst fyri ferðavinnuna.

Mynd: Erik Davidsen

100-ára haldið.

Í samband við føðingardagin hjá Sørvágs kommunu í ár, hava vit havt ymisk tiltøk, har vit hava roynt at seta kommununa í miðdepilin.

Fyrsta tiltakið var at stuðla felagnum Frælsinum, sum hevði sína fyrstu renning í kuldanum í frostinum í januar mánaði. Tiltakið eydnaðist við hjálp frá Landsverk, sum vóru so beinasamir at salta vegirnar. Luttakararnir vóru nøgdir við tiltakið, hóast luttakararnir máttu bíða, meðan kavin bráðnaði.

Seinasta tiltakið í samband við føðingardagin, sum nevnast skal, er tiltakið fyri skúlabørnunum við foreldrum ella avvarðandi. Hvørji ynski hevur tú, tá talan er um tilboð í kommununum ? Tey fimm fremstu ynskini hjá næmingunum, børnum ella avvarðandi vóru hesi:

1. Spælipláss 27
2. Svimjihøll 19
3. Størri høll 14
4. Frítíðartilboð 12
5. Mat í kantinuni 11

Tað var Vinnunevndin, Sørvágs skúli og felagið Fegin v/ Niclas Hera Jákupsson, sum í felag samskipaðu hesum tiltøkum.

Atlantic Airways

Føroyska flogfelagið húsast eisini í okkara kommunu. Teirra virksemi avspeglast eisini í inntøkunum hjá kommununum í Vágum. Starvsfólkatalið liggur um 170 ársverk.

Samlaða framleiðslan hjá felagnum minkaði 23% fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2015 í mun til sama tíðarskeið í fjør. Tímatalið innan leiguflúgving fall við 61%, meðan tímatalið innan rutuflúgving øktist við 8%.

Fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2015 fevndi rutuflúgvingin um 72% av framleiðsluni, meðan leiguflúgvingin fevndi um 20% og tyrluflúgvingin um 8%.

Í 2015 hevur felagið flogið rutuflúgving alt árið til Keypmannahavnar, Billund, Reykjavíkar og Bergen og frá mars 2015 eisini til Edinburgh. Harumframt varð flogið til Aalborg, Barcelona og Mallorca í summar.

Harumframt fleyg Atlantic Airways eisini á vári 2015 tríggjar ferðir aftur og fram beinleiðis úr Vágum til Sardinia og á heysti 2015 tríggjar ferðir aftur og fram beinleiðis úr Vágum til Róm

Á NORÐ-rutunum verður í tíðarskeiðnum apríl til oktober flogið fýra ferðir um vikuna til Bergen, tríggjar ferðir um vikuna til Reykjavíkar/Keflavíkar og frá 18. mars tvær ferðir um vikuna til Edinburgh. Um veturin verður flogið tríggjar ferðir um vikuna til Bergen og tvær ferðir um vikuna til Reykjavíkar.

Til Keypmannahavnar verður vetrarhálvuna flogið dagliga tvær ferðir aftur og fram og upp í 4 ferðir dagliga um summarið. Til Billunds verður hvørja viku flogið tvær ferðir aftur og fram um veturin og upp í sjey ferðir um vikuna um summarið.

Ferðafólkatalið á rutunetinum er fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í 2015 økt 12% úr 188.771 upp í 212.115 ferðafólk í mun til sama tíðarskeið í fjør.

Atlantic Airways hevði 20 mió. kr. í avlopi fyri skatt í 2014 í mun til 9 mió. kr. í avlopi fyri skatt í 2013.

Felagið hevur í 2015 undirskrivað sáttmála um keyp av tveimum nýggjum AgustaWestland 139 tyrlum og einum Airbus A320 flogfari. Fyrra tyrlan varð latin felagnum í desember 2015, og hin seinna verður latin í mars 2016. Nýggju tyrlurnar avloysa gomlu Bell 412 tyrlurnar. Nýggja A320 flogfarið verður latið felagnum í desember næsta ár.

Flotin telur nú trý Airbus A319 flogfør, eina Bell 412 tyrlu og eina AW 139 tyrlu. Harumframt er eitt RJ-100 flogfar langtíðarleigað til Malmø Aviation. A319 flogførini taka 144 ferðafólk, ið er munandi fleiri enn við gomlu flogførini. Øll A319 flogførini er útgjørd við framkomnari RNP AR-navigatiónsútgerð, ið hevur bøtt munandi um reglusemi á rutum felagsins.

Vága Floghavn 2015

Nógv virksemi hevur verið á flogvøllinum seinasta árið og met nógv ferðafólk hava ferðast ígjøgnum nýggju farstøðina, og farstøðin hevur sum heild riggað sera væl. Í farstøðini húsast Atlantic Airways, AVIS, 62N, Visit Vagar og Taks. Harumframt hevur Gist & Vist tvey matarstøð og Duty Free FAE hevur eisini nógv virksemi har. Ferðafólkini hava tikið sera væl ímóti nýggja handlinum, og sølan er vaksandi.

Í nýggja tænastubygninginum húsast umframt Føroya Politi og Posta eisini Atlantic Airways og roynast umstøðurnar eisini her sera væl. Vága Floghavn hevur nú eisini fingið samlað sítt egna virksemi í nýggja tænastubygninginum. Umframt umsitingina og havnarskrivstovu, so húsar bygningurin eisini brandstøðina, verkstaðin og kavaruddingaramboðini hjá Vága Floghavn.

Gamla farstøðin er nógv umbygd. Har húsast nú Gist & Vist, goymsla hjá Duty Free FAE og Atlantic Airways. Harumframt flutti EUR Express inn í gomlu farstøðina í mars, og hava teir skrivstovu og goymslu á staðnum. Tornið er umvælt og nýggj útgerð sett upp. Starvsfólkini í torninum húsast nú aftur í ovastu hædd, og eru umstøðurnar og útsýnið nógv betur enn áður.

Vága Floghavn arbeiðir í løtuni við íløguætlan fyri 2016. Av teimum størru íløgunum kann nevnast, at ætlanin er at útbyggja parkeringsøkið og gera nógv greiðari skelting. Harumframt, so hevur Vága Floghavn keypt tveir nýggjar brandbilar, sum væntandi koma til landið síðst í februar. Teir gomlu brandbilarnir, sum eru um 20 ára gamlir, eru seldir til ein danskan flogvøll og fara væntandi av landinum miðskeiðis í mars.

Vøksturin í ferðafólkatalinum sær út til at halda fram. Vága Floghavn metir, at samlaði vøksturin fyri alt árið verður umleið 11%. Hetta merkir, at eini 275.000 ferðafólk fara at ferðast um flogvøllin í 2015. Tað eru 25.000 ferðafólk fleiri enn í 2014.

Vága Floghavn vil annars nýta høvið til at takka Sørvágs Kommunu fyri sera gott samstarv hetta seinasta árið og vónar, at tað kann halda áfram komandi árini.

Hiddenfjord

Í 2006 skrivaðu vit at P/f Luna hevði sett smolt út á fjørðin, og at virksemið vónandi fór at verða størri árið eftir, tá laksurin fór at verða tikin.

Í tíðindaskrivinum frá 2008 varð skrivað, at felagið hevði keypt bláa bygningin á havnalagnum, og at ætlanin var at kryvja allan fiskin á kryvjivirkinum í Sørvági.

Nøgdirnar, sum eru viðgjørdar á virkinum, eru støðugt vaksandi, og í 2013 og 2014 vórðu tikin heili 10.000 tons.

Í 2014 varð farið undir at útbyggja virkið, og hevur hetta arbeiðið hildið fram í 2015. Av virkinum verður sagt, at nøgdirnar verða nakað minni í ár, 8.500 tons, tá árið er liðugt. Umbyggingin hevur sett stór krøv til starvsfólk og veitara, men hóast avbjóðingarnar, hevur arbeiðið gingið eftir ætlan.

Tey siga í skrivi til okkum, at tey vilja takka fyri sera gott samstarv í brátt farna ári, við ynskjum um eini gleðilig jól og eitt gott nýggjar.

Mynd: Erik Davidsen

EUR-Express

EUR-Express, sum var stovnað í 2006, hevur ment seg ár eftir ár við góðari tænastu innan sjó- og flogfrakt, og telist í dag millum fremstu flutningsfyritøkur í landinum.

Fyritøkan var eitt stutt tíðarskeið í Havn, men flutti so vestur í Vágar, og hevur húsast oman fyri flogvøllin síðani 2009.

EUR-Express hevur nú gjørt leigusáttmála við Vága floghavn, og hevur leigað ein part av gomlu farstøðini at húsast og virka í. Hetta ger, at tey kunnu lofta flogfraktini beinanvegin, tá flogførini lenda, og at at tey eru til staðar, har tað hendir, meta tey sum eina styrki.

Fyritøkan, sum byrjaði við 3 starvsfólkum, er nú komin upp á 8, sum hava nóg mikið at gera hvønn dag.

Sp/f KJO

Síðsta hond er við at verða løgd á høllina á Hálsi í Sørvági. Tað er vinnufyritøkan Sp/f KJO - við Kristian Olsen í Sørvág,i sum letur høllina byggja.

Høllin er 600 fermetrar til víddar, umframt at høllin skal rúma virkseminum hjá fyritøkuni, skal ein partur eisini leigast út.

Sum 24 ára gamal fór Kristian Olsen undir at reka virksemi við lastbilum og maskinum, og hetta hevur hann nú gjørt í heili 31 ár. Vinnan hevur broytt seg nógv gjøgnum árini, og tað er umráðandi, at man tillagar seg tíðina vit liva í.

Mesta arbeiðið hjá KJO í løtuni er laksaflutningur fyri Hiddenfjord, men annað virksemi er eisini millum annað útgrevstur, koyring við kranabili, har t.d. avtala er gjørd við Sandavágs Timburhandil um flutning av størri materiali.

Og hann sigur víðari "*Vit eru altíð klárir at átaka okkum eina og hvørja uppgávu"* Tað er bara at seta seg í samband við okkum tlf. 210452 og 210952

Fyritøkan eigur í dag 5 bilar og 11 vognar.

Jim S

Ídnaðarøkið á Hálsi fer nú at líkjast, tá talan er um bygningar. Talið av fyritøkum er vaksandi, og nú húsast hesi feløg á økinum: Landsverk, Berg Rasmussen, Vága bjargingarfelag, Jim S og Kristian Olsen.

Fyritøkan hjá Jim Sonna Guttesen hevði í ár 10 ár á baki, og Jim S bygdi fyrsta bygningin á ídnaðarøkinum fyri 8 árum síðani.

Virksemi hjá felagnum hevur verið vaksandi øll árini, og í 2015 hava 10 fólk verið knýtt at fyritøkuni. Fyritøkan ger alt innan gólv og baðirúm hjá privatfólki umframt alt innan sama øki hjá stovnum og fyritøkum.

Av stórarbeiðum í ár kann nevnast læknamiðstøðin í Vestmanna, Bank Nordik, Arbeiðsmannafelagshúsið við Tinghúsvegin og Sjóvinnuhúsið á Vestaru bryggju.

Her vesturi hevur fyritøkan gjørt arbeiði fyri Luna, Zarepta og 07-Vestur, og samlaða talið av fermetrum, sum lagdir eru á gólv, í brátt farna ári liggur millum 10.000 – 12.000.

Umframt vanligu gólvloysnina hevur fyritøkan keypt útgerð til at slípa betong og viðgera tað, eins og fyritøkan eisini er farin at gera fugufrí gólv.

Samanumtikið letur Jim Sonni Guttesen væl at, og ordrabókin fyri 2016 er við at verða uppfylt.



Alt fær ein enda - eisini kappingarárið 2015.

07 Vestur er vorðið eitt stórt fótbóltsfelag. Í ár hava vit havt umleið 350 íðkandi limir og 28 lið meldaði til kappingar hjá Fótbóltsambandium.
Vit, ið varða av 07 Vestur, eru í høvuðsheitum nøgd við kappingarárið, sum er farið afturum. Nøkur av teimum málum, sum vit settu okkum, rukku vit. Málið, sum vit settu okkum, um at fáa 3. deildarliðið upp í 2. deild, er rokkið. Somuleiðis hava vit havt leikarar á fleiri av ungdómslandsliðunum bæði hjá dreingjum og gentum, og tað fegnast vit um. Ætlanin var, at 1. deild skuldi flyta upp í Effodeildinum, men her gjørdust vit ov stuttir.
Hjá einum felag ræður tað sjálvsagt um at fáa so góð úrslit sum møguligt. Men eftir ein slíka skakandi hending, sum var í Klaksvík 16.08.2015, har ein av okkara ungu og evnaríku leikarum fekk hjartasteðg, missur fótbólturin sín týdning. 07Vestur vil takka liðleiðarum okkara, sum bóru skjótt at og veittu fyrstuhjálp á staðnum. Eisini takka vit hjartaliga teimum norðuri í Klaksvík fyri teirra skjótu og munagóðu hjálp, bæði undir sjálvum tilburðinum og ikki minst fyri umsorgan, sálarliga fyrstuhjálp og mat.
Eitt nýtt kappingarár stendur fyri durum er 07 Vestur væl fyrireikað. Okkara flaggskip hevur stórt sað sama hóp sum undanfarna kappingarár. Tvær broytingar eru; Jákup F. Hansen er farin aftur til HB og Kristian Joensen er farin til KÍ.
Tað er altíð keðiligt at missa tílíkar leikarar, men vit ynskja teimum sjálvandi góða eydnu og alt tað besta í komandi ári.
Tveir nýggir leikarar hava skrivað undir sáttmála við okkum til komandi kappingarár. Báðir eru teir úr TB, Ivan Stojkovic er málverji og kom til Føroya í 2007. Hann hevur spælt 250

dystir við besta liðinum hjá TB. Hin leikarin er Martin Tausen. Martin er 25 ára gamal og hevur leikt við TB seinastu 5 árini. Martin Tausen hevur leikt 119 dystir í meistaradeildini. Martin kann bæði leika í miðverjuni og á miðvøllinum. Vit bjóða teimum báðum vælkomnum vestur.
Okkara 1. deildar lið, hevur eins og seinasta kappingarár, sett sær sum mál at flyta upp í Effodeildina. Vónandi fer hetta at bera á mál. Okkara 2. deildar lið fer vónandi at styrkja seg í 2. deild.
07 Vestur er nógv meiri enn 1. deild - vit hava 2. deild, 3. deild og eina stóra ungdómsdeild, bæði hjá gentum og dreingjum.
Kappingarárið 2016 fara heimadystirnir hjá 1. deild at verða spældir á Dungasandi í Sørvági. Og tað nýggja felagshúsið hjá felagnum fer at verða liðugt, tá ið kappingarárið byrjar 2016. Húsið fer at bøta munandi um karmarnar hjá felagnum.

Eg vil at enda takka tykkum øllum, ið standa rundan um felagið, kommunum, stuðlum og øllum tykkum ið brúka ein stóran part av tykkara tíð í felagnum. Uttan tykkara vælvild onki felag!

SÍ

Tíðin stendur ikki í stað, og nú vit skjótt skriva 2016, leita vit aftur til farna kappingarár og sigast kann, at tað gekk sera væl við flogbóltinum í Sørvági. SÍ var væl umboðað í steypafinalunum fyrr í ár, har vit vóru við í heili 6 av 8 finalum. Eisini í FM finaluumfarinum stóð ungdómurin hjá SÍ seg væl. Vit vóru við í 5 av 6 finalum - har D12 endaðu við at gerast føroyameistarar. Okkara Eikliga kvinnur hava í eitt longri tíðarskeið havt eitt skifti av leikarum, og við hjálp frá ungum røskum gentum, endaðu tær á einum flottum 3. plássi í landskappingini í ár. Mennirnir gjørdust steypavinnarar, men fingu ein heldur keðiligan enda upp á kappingarárið, tá Flogbóltssambandið valdi at taka liði úr landskappingini vegna manglandi uppmøting til tveir dystir! Ein keðilig støða, men um vit hyggja eftir teimum í dag, sær tað út til, at tann avgerðin var tann rætta, tí nú gongur rætta vegin við mansflogbóltinum hjá SÍ, og teir eru har sum teir plaga at verða – nevniliga á toppinum.

Áðrenn farið verður til núverandi kappingarár, vilja vit líka leggja afturat, at úr SÍ vórðu tríggir limir heiðraðir á ársins gallaveistluni fyrr í ár. Annika á Stongum varð, sum fleiri ferðir fyrr, heiðrað sum ársins hevari. Okkara unga og dugnaliga Sissal Ellefsdóttir varð kosin sum ársins stjørnuskot, meðan Sonni Zachariasen varð valdur sum ársins dómari 2014-2015. Stórt til lukku til tykkum!

Hyggja vit eftir kappingini í ár, stendur væl til hjá SÍ – kanska betur enn seinast. Børnini, sum spæla kidsvolley, klára seg væl til tær ymisku kappingarnar, sum eru kring landið. Landskappingin er hálvrunnin, og tað gongur sera væl hjá ungdóminum - fleiri av teimum hava longu spælt seg í steypafinaluna, sum verður fyrst í komandi ári. Eikligan kvinnur liggja bert tvey stig frá fyrsta plássinum, meðan menninir liggja nr. 1 í kappingini. 1. deild menn hava vunnið allar sínar dystir í ár, meðan 2. deild kvinnur liggja nr. 2.

Í bestu deildini er steypakappingin broytt. Spælt verður í tveimum bólkum í desember, har nr. 1 og 2 í hvørjum bólki spæla seg víðari í semifinaluna, sum verður 2 januar 2016. Menninir hava longu tryggjað sær pláss í semifinaluni, meðan kvinnurnar enn hava møguleikan at røkka hesum.

Sigast kann, at flogbólturin í Sørvági hevur eina góða gongd. Í september mánaði vóru gentur og dreingir 14 við í einari kapping í Danmark, har bæði liðini vunnu gull, so her síggja vit, at vit eisini kunnu spæla upp ímóti okkara grannalondum! Vit eru samstundis við í toppinum í føroysku kappingunum, og tað er har, vit vilja vera. Okkara framtíð liggur í ungdóminum, og úrslitini hesi seinastu árini boða frá góðum. MEN dreymurin hjá felagnum er, og hevur altíð verið, at vit kunnu bjóða okkara leikarum teir bestu karmarnar innan fyri flogbóltin. Sum nú er, eru alt ov fáir venjingartímar, og umstøðurnar eru ikki tær bestu! Tá Eik-ligan spælir á útivølli, sæst ferð eftir ferð, at leikarar hava trupult við at spæla, og nógv bendir á, at spælið hevði verið enn betur, um vit høvdu betri umstøður at vant undir. Tí hevði tað verið sera ynskiligt við einari størri høll, bæði soleiðis, at vit kunnu fáa meir venjingar, og at venjingin kann verða meira skipa og løgd til hvønn einstaka leikara, samstundis, sum tað er pláss fyri at fáa fleiri av okkara trúgvu áskoðarum til okkara heimadystir.

Sørvágur er kend sum ein flogbóltsbygd. Vit hava havt og hava nakrar ótrúliga dugnaligar leikarar og venjarar, og høvdu umstøðurnar verið betur, so ivast vit ikki í, at úrslitini høvdu verðið enn betur enn tey eru í dag.

Vit í SÍ vilja takka bæði leikarum, venjarum, hjálparum, stuðlum, foreldrum og ikki minst áskoðarum fyri dyggan stuðul í farna ári. Eisini vilja vit takka fyri góðu undirtøkuna og hjálpina til SÍ dagin, sum vit høvdu herfyri. Dagurin eydnaðist sera væl og gav eitt gott íkast til raksturin hjá felagnum. Men eitt slíkt tiltak letur seg ikki gera uttan tykkum øll – stóra takk!

Við hesum skrivi vilja vit í SÍ nýta høvið at ynskja tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýttár.

Í nevndini: John Kruse, Maja Henriksen, Vivian Joensen, Hanna Helena W. Simonsen, Jónley Poulsen, Birna Henriksen, Barbara R. Mouritzen og Beinta Henriksen.

Sørvágs Country- og Blues Festivalur.

Sørvágs Country- & Bluesfestivalur var í døgunum 4. til 6. juni 2015, og skipaður eftir sama leisti, sum undanfarnu ár. Fyrsti festivalurin var í 2012 og hevur hetta verið eitt afturvendandi tiltak síðani.

Í árunum 2012 til 2014 hava vit verið vælsignað við seta góðum veðri, men í 2015 hendi tað, sum ikki má henda: Veðrið var serstakliga vánaligt, og var tí neyðugt at gera broytingar í evstu løtu. Hóast hetta, eydnaðist festivalurin hampiliga væl.

At skipa fyri tílíkum tiltaki hevur sera stóran fíggjarligan váða við sær, umframt at tað er nógv pratkisk viðurskiftir, sum skulu avgreiðast. Uttan fíggjarliga hjálp frá stuðlum og hjálp frá Sørvágs kommunu og bygdafólki annars, hevði hetta als ikki borið til.

Hóast eitt ávíst bakkast í 2015, varð beinanvegin avgjørt at halda fram í 2016, og verður festivalurin hin 10. og 11. juni komandi ár.

Síðani byrjan hevur festivalurin verið skipaður í tøttum samstarvi við Sørvágs kommunu, umframt at festivalurin eisini hevur samstarv við Summarfestivalin í Klaksvík og Bátafestivalin í Vestmanna. Hesi samstørv eru grundleggjandi og halda fram í komandi ári.

Komandi festivalur verður skipaður eftir sama leisti, sum undanfarin ár, har byrjað verður við bassadegi og eldratiltaki 9. juni og festivalurin settur 10. juni.

Tað verður Vága kunningarstova, sum tekur sær av campingsølu og eldratiltaki.

Forsølan av atgongumerkjum byrjaði á contry.fo hin 9. desember 2015 og heldur fram til festivalin.

Samanberingar millum kommunurnar ú roknskapinum frá 2014

Tað hevur týdning at vita heldur enn at gita. Vit mugu hyggja eftir rakstrinum og ansa eftir, at tær rakstrarútreiðslur, sum vit samtykkja, eru torførar at fáa burtur aftur.
Hvar liggja vit í mun til aðrar, er neyðugt at hava eina hóming av. Tí hesar talvur.

Roknskapur 2014

Kommununavn	Rakstur	Skattur	Rakstur í %	Raðfylgja	Nettosk. pr. íbúgva t.kr.	Raðfylgja
Klaksvík	108.566	169.819	63,9	1	22	4
Sjóvar	19.825	30.592	64,8	2	20	3
Sørvág	25.627	38.578	66,4	3	18	2
Fuglafjarðar	36.948	55.450	66,6	4	27	5
Runavík	88.801	131.514	67,5	5	30	7
Vága	45.046	65.011	69,3	6	31	8
Tórshavn	480.013	679.133	70,7	7	-8	1
Tvøroyri	43.357	58.528	74,1	8	36	9
Vágs	29.404	38.478	76,4	9	29	6

Av teimum kommunum vit hava valt, liggur Klaksvík á fyrsta plássi, meðan vit liggja á triðja plássi, tá talan er um rakstur í mun til skatt.

Tá talan er um skuld, liggur Tórshavn á fyrsta plássi, og eigur 8.000 kr. til hvønn borgara.

Vit liggja á øðrum plássi við 18.000 kr. í skuld fyri hvønn borgara.

Fíggjarætlanin 2016

Bygdaráðið samtykti einmælt fíggjarætlanina á fundi mikukvøldið 25. November 2015.

Hetta eru høvuðstølini:

Rakstur		Inntøkur
Rakstrarútreiðslur	40.551.000	
Avdráttir	2.924.000	
Rakstur + avdráttir	43.475.000	
Íløgur	15.190.000	

Samlaðar útreiðslur	**58.665.000**	
Inntøkur	49.919.000	
Lán	7.000.000	
Av gjaldføri	1.746.000	
Inntøkur, lán og gjaldføri		**58.665.000**

Bygdaráðið samtykti at taka 7 mió. í láni og at brúka 1.746 mió. av egnum gjaldføri.

Skattaprosentið verður óbroytt 21,7%, meðan barnafrádrátturin hækkar úr 4.500,- kr. upp í 5.000,- kr. fyri hvørt barnið.

Fíggjarstøðan.

Nettoskuldin hjá Sørvágs kommunu var 23.156.000 kr. við árslok 2013. Í 2014 var hon komin niður á góðar 20 mió., og verður nógv lægri við árslok í ár.

Í samband við at kommununnar hava yvirtikið eldraøkið, kann tað verða ørkymlandi at samanbera við onnur ár. Vit siga í fíggjarætlanini at inntøkan er 49.919.000 kr. Tá er endurgjaldið frá landinum til eldraøkið íroknað. Vantandi fáa vit hesa upphæddir frá landinum til eldraøkið:

Skattur av eftirlønargjøldum:	7.129 mió.
Flyting vegna DIS, FAS og aðrar frádráttir	4.092 mió.
Tíðaravmarkað flyting	0,124 mió.
Inntøkur frá landi:	11.345 mió.

Fyri at reka Heimatænastuna í Vágum verður okkara partur í 2016 11.734. mió. Tað við siga, at halda metingarnar, so mugu vit taka (11.734 – 11.345) = 389.000 úr kommunukassanum. Tað, sum vit taka úr kommunukassanum er tað, sum vit fáa ov lítið útborið fyri eldraøkið.

Tað er kanska vert at nevna, at í samband við eldraøkið fáa kommunurnar endurgjald fyri tað, sum kommunan missir í kommunuskattinum í samband við, at borgarar í kommununi eru undir øðrum skattaskipanum.

Íløgur 2016

Á Sýnini	1.800.000
Á Stakka	600.000
Skúlin	300.000
Skúlin	5.200.000
Musikkskúlin	110.000
Hornorkestrið	60.000
Søgan	70.000
Minnisvarðin	200.000
Felagshúsið á Dungasandi	800.000
Fríðkan	350.000
Byggibúning	600.000
Vatn	100.000
Kloakk	500.000
Vegir	900.000
Gøtuljós	100.000
Verkhúsið	500.000
Havnin	3.000.000
Samanlagt	15.190.000

Á Sýnini

Í tíðindaskrivinum í fjør skrivaðu vit, at vit høvdu valt at hækka skattaprosentið við 0,7 prosentum, ið svaraðu til tær útreiðslur, sum vit óvæntað høvdu fingið í samband við yvirtøkuna av eldraøkinum. Stuttfreistaða lánið frá landskassanum er bert 4 ár og 8 mánaðir. Vit byrjaðu at gjalda 1. januar í ár, og tá hetta bygdaráðsskeiðið er lokið næsta ár, er knøpp helvtin av láninum goldið.

Heimið verður umvælt eftir eina kostnaðarmeting, sum Landsverk hevði gjørt. Tá arbeiðið varð útboðið, vísti tað seg at kostnaðurin var væl hægri, enn mett var frammanundan. Kommunurnar samdust um at hækka sín lut í fíggingini við 5 mió. kr. og heittu á Landsstýrið um at gera tað sama. Men svarið haðani var nei. Okkara lutur í mun til meirútreiðsluna verður 1.8 mió. kr.

Á Stakka

Arbeitt hevur í fleiri ár við at finna eitt øki, har fólk kunnu savnast, og har lívd er. Stakka liggur í miðbygdini, og tað hevur eydnast okkum at keypa havan hjá grannanum norðanfyri.

Bygdaráðið hevur latið West-Tech gera eitt uppskot, sum verður lagt fyri bygdaráðið ein av fyrstu døgunum.

Høvuðsendamálið við økinum er:

Stakka

- Ætla til hugna og samkomur fyri yngra og eldra ættarliðið.

Havin:

- Ætla børnum. Her er spælipláss, har atlit eisini eru tikin til samveru millum børn og foreldur
- Umframt bygning til vesi og goymslu.
- Økini verða bundin saman við gøtum, og stórur dentur er lagdur í, at økini bæði kunnu virka saman og hvør sær.

Skúlin

Vit nevndu í fjør, at tað í nærmastu framtíð fór at verða neyðugt við ábøtum og umbyggingum, tá talan er um nýbygningin, sum hongur uppi í svimjihøllini, nýggju fimleikarahøllini og ovara partin av stovulonini.

Tá var eisini sagt, at vindeygu í skúlastovunum høvdu stutt sagt likið frá fyrsta degi, og fakfólk halda einastu røttu loysnina vera, at taka takvindeyguni burtur, og framsíðan verður førd fram ájavnt við niðara hæddina.

Støðan er ikki batnað, og bygdaráðið heldur ikki at tað gevur nakra meining at pjøssa upp á vindeygu og tekju, og tí er endalig støða tikin til at gera eina veruliga dagføring av Niðarulon. Við at føra ovaru hæddina út ájavnt við niðaru hæddina, fáa vit heilt onnur rúm, bæði í rúmd og vídd.



Mentan

Tá tað snýr seg um mentan, so hevur bygdaráðið eftir førimuni roynt at stuðla. Í komandi ári er ætlanin at stuðla keyp av ljóðførum, bæði til skúlan og Sørvágs Tónleikarafelag eins og peningur er settur av til fjórða bind um Sørvágs kommunu. Eisini er ætlanin at koma eitt stig nærri einum minnissteini um teir, ið ikki bóru boð í bý.

Felagshúsið á Dungasandi

Sitandi bygdaráð hevur goldið ta upphædd, sum avtalað varð fyri hetta valskeiðið. Vit vóru vitandi um, at upphæddin fór ikki at verða nóg stór til alla byggingina. Ætlanin er at fáa eina avtalu um nýtslu við 07-Vestur um ovaru hæddina, og tað er upphæddin í íløgulistanum sett av til.

Mynd: Erik Davidsen

Verkhúsið o.a.

Peningur er avsettur til Verkhúsið á Toft. Arbeiðið umfatar umskipan av hølum soleiðis, at bøtt verður um umstøðurnar hjá búfólkunum.

Av øðrum íløgum kunnu vit siga, at tær eru kendar frá árunum frammanundan. Vit eru við at verða í uppisetri við grundstykkjum, nakað av peningi verður brúkt til vegagerð, og ávís upphædd eigur og verður sett av til kloakkætlanina.

Mynd: Erik Davidsen

Havnin

Træbryggjan hevur sæð sínar bestu dagar og stendur uppi nærum av gomlum vana. Vit vóna, at hon klárar henda veturin eisini, tí í komandi ári verður hon tikin niður og nýggj pelakei sett upp.

Træbryggjan hevur tænt fyri seg. Sambært Landsbyggifelaganum varð avhendingarskjalið undirskrivað 22. desember 1966, so tað verður ein hálv øld ímillum, at byrjað varð upp á hesa, til byrjað verður upp á ta nýggju.

Bygdaráðsfundir 2016.

Bygdaráðið hevur ásett føstu bygdaráðsfundirnar fyri 2016. Fundirnir verða kl. 18:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðanfyri nevndu dagar.

Mikukvøldið 27. januar

Hóskvøldið 25 februar

Mikukvøldið 30 mars

Mikukvøldið 27 apríl

Mikukvøldið 25 mai

Mikukvøldið 29 juni

Mikukvøldið 07 september

Mikukvøldið 28 september

Mikukvøldið 26 oktober

Mikukvøldið 09 november

Mikukvøldið 30 november

Mikukvøldið 07 desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri fundin.

Eykafundir ella broytingar í skránni verða lýstir í svørtu talvur á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu

At enda

Bygdaráðini hava tey seinastu árini roynt at lívga um tað, sum vit vanliga kalla kjarnuøkini hjá einari kommunu. Fyrst varð barnagarður bygdur, síðani gamli skúli um- og útbygdur. Sýnin verður umbygd og nú er ætlanin at dagføra nýggja skúlan og træbryggjuna. At tað ber til hjá okkara kommunu at gera íløgur á heilar 15 mió. í einum ári kemst av, at at bygdaráðið hevur verið tilvitað um, at hava stabilitet, tá talan er um skattaprosentið. Vit eru ein miðalstór kommuna við spjaddari búseting, so okkara mál hevur verið at havt eitt miðal skattaprosent.

Í hesum valskeiðinum hava vit roynt at goldið skuldina niður, soleiðis, at tað ber til at gera tær íløgur, sum vit fara at gera í komandi ári.

Og gongur alt eftir vild, so kunnu vit, sum sitið hava í bygdaráðnum síðstu árini til næsta kommunuval við uppreistari pannu siga, at tit, sum nú fara at ráða fyri borgum, yvirtaka eina kommunu, sum fíggjarliga er væl fyri samanmett við nógvar aðrar kommunur. Fólkatalið er eisini vaksandi. 01. nov. 2014 vóru vit 1.081 íbúgvar í Sørvágs kommunu. Eitt ár seinni, 01. nov. 2015 vóru vit 1.113 ella 32 fleiri. Hetta er nokk størsta íbúgvaratal nakrantíð.

Og latið okkum enda hetta árið við orðunum hjá Grundtvig gamla.

Takk fyri hetta árið við
og alt á sjógv og landi.
Tú yvir vaksin lýs tín frið
og hvønn ein pilt á sandi!

Og við hesum fari eg vegna bygdaráðið og starvsfólk okkara at ynskja tykkum eitt av Harranum signað nýggjár.

Sørvágur, 17.12.2015

Sune Jacobsen, borgarstjóri

Mynd: Magda Guttesen

Høvuðsyvirlit yvir Fíggjarætlanina fyri 2016

	Játtan		
	Rakstur og útlán		
Túsund kr.	**Útreiðslur**	**Inntøkur**	**Løgur**
Kommunal fyrisiting	**3.475**	**-**	**-**
11. Felagsútreiðslur	3.475	-	-
Almanna- og heilsumál	**15.239**	**-**	**1.800**
20. Heilsumál	1.314	-	-
21. Almannamál	13.925	-	1.800
Børn og ung	**6.695**	**-**	**-**
26. Barnaansing	6.695	-	-
Undirvísing	**3.955**	**-**	**5.500**
23. Útbúgving og gransking	3.955	-	5.500
Mentan og frítíð	**2.081**	**-**	**1.040**
23. Útbúgving og gransking	403	-	-
24. Mentan	1.678	-	1.040
Teknisk mál	**4.493**	**-**	**3.850**
11. Felagsútreiðslur	993	-	1.650
22. Íbúðarmál	-	-	600
24. Mentan	234	-	-
30. Umhvørvi	866	-	600
38. Samferðsla og samskifti	2.400	-	1.000
	-	-	-
Kommunal virki	**3.053**	**-**	**3.000**
30. Umhvørvi	2.048	-	-
31. Tilbúgving	466	-	-
38. Samferðsla og samskifti	539	-	3.000
Tilsamans	**38.991**	**-**	**15.190**
22. Íbúðarmál	700	-	-
35. Sjóvinna	-	-	-
50. Rentur	860	50	
52. Skattir og avgjøld	-	49.869	-
Tilsamans	40.551	49.919	15.190
Yvirskot	-	9.368	-
	Útreiðslur	**Inntøkur**	**Yvirskot**
Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÙ	**-**	**-5.822**	**-**
60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	-	1.746	-
Nettokassaúrslit	**-**	**-4.076**	**-4.076**
62. Afturgjald av skuld	2.924	-	-
Bruttokassaúrslit	**2.924**	**-4.076**	**-7.000**
Fígging:			
64. Útvegan av gjaldføri	-	7.000	-
Fíggjan í alt:	-	7.000	-
Samanlagt	**2.924**	**2.924**	**-**

Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 2014

	Játtan			Roknskapur		
	Rakstur og útlán			Rakstur og útlán		
Túsund kr.	Útreiðslur	Inntøkur	Løgur	Útreiðslur	Inntøkur	Løgur
Kommunal fyrisiting	**3.005**	**-**	**150**	**3.081**	**-83**	**-**
11. Felagsútreiðslur	3.005	-	150	3.081	-83	-
Almanna- og heilsumál	**3.078**	**-**	**-**	**3.131**	**-**	**-**
20. Heilsumál	1.384	-	-	1.529	-	-
21. Almannamál	1.694	-	-	1.603	-	-
Børn og ung	**7.089**	**-**	**96**	**6.223**	**-**	**19**
26. Barnaansing	7.087	-	96	6.223	-	19
Undirvísing	**3.684**	**-**	**6.916**	**3.846**	**-**	**6.197**
23. Útbúgving og gransking	3.684	-	6.916	3.846	-	6.197
Mentan og frítíð	**2.297**	**-**	**600**	**1.977**	**-**	**653**
23. Útbúgving og gransking	399	-	-	531	-	-
24. Mentan	1.898	-	600	1.447	-	653
Teknisk mál	**4.201**	**-**	**2.283**	**4.205**	**-**	**1.880**
11. Felagsútreiðslur	902	-	450	836	-	441
22. Íbúðarmál	-	-	160	-	-	-37
24. Mentan	143	-	-	93	-	-
30. Umhvørvi	813	-	574	755	-	558
37. Handil og vinna annars	-	-	-	-	-	-
38. Samferðsla og samskifti	2.343	-	1.170	2.521	-	917
Kommunal virki	**3.242**	**-**	**270**	**3.080**	**-**	**113**
30. Umhvørvi	2.047	-	-	2.035	-	-
31. Tilbúgving	571	-	-	603	-	-
38. Samferðsla og samskifti	624	-	270	442	-	113
Tilsamans	**26.594**	**-**	**10.315**	**25.544**	**-83**	**8.862**
22. Íbúðarmál	900	-	-	802	-	-
35. Sjóvinna	-	-	-	-	-	-
50. Rentur	1.053	90		1.027	69	
52. Skattir og avgjøld	-	34.136	-	-	39.379	-
Tilsamans	28.547	34.226	10.315	27.372	39.366	8.862
Yvirskot	-	5.679	-	-	11.993	-
	Útreiðslur	**Inntøkur**	**Yvirskot**	**Útreiðslur**	**Inntøkur**	**Yvirskot**
Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÙ	**-**	**-4.636**	**-**	**-**	**3.131**	**-**
60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	-	6.154	-	-	-1.783	-
Nettokassaúrslit	**-**	**1.518**	**1.518**	**-**	**1.348**	**1.348**
62. Afturgjald av skuld	1.518	-	-	1.580	-	-
Bruttokassaúrslit	**1.518**	**1.518**	**-**	**1.580**	**1.348**	**-232**
Fígging:						
64. Útvegan av gjaldføri	-	-	-	-	232	-
Fíggjan í alt:	-	-	-	-	232	232
Samanlagt	**1.518**	**1.518**	**-**	**1.580**	**1.580**	**-**